## UTTAN ÚR HEIMI

## Væntar afturgongd í búskapinum

Vøksturin í altóða búskapinum verður nógv minni enn væntað bæði í ár og næsta ár, sigur Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF

Fyri bara einum mánað síðani væntaðu búskaparfrøðingarnir hjá grunninum, at framgongdin fór at verða 3,5 prosent næsta ár, men útlitini hendan seinasta mánaðin eru versnað so nógv, at grunnurin nú væntar, at framgongdin verður 2,4 prosent. Tað er sama framgongd, sum grunnurin væntar í ár.

Stjórin í IMF, Horst Köhler, segði í gjár, at tað er sera trupult at meta um gongdina í altjóða búskapinum eftir yvirgangsatsóknirnar í USA fyri góðum tveimum mánaðum síðani. Hann skundaði sær tí at skoyta uppí, at tann seinasta metingin er óviss, og at tað kann gerast neyðugt at kanna gongdina eina ferð afturat.

Hóast útlitini hjá fleiri londum og fleiri vinnugreinum eru døpur í løtuni, væntar Altjóða Gjaldoyragrunnurin ein lítlan bata í heimsbúskapinum næsta ár.

Roknað verður við, at vøksturin í amerikanska búskapinum verður 1,1 prosent í ár og nakað niðan fyri 0,7 prosent næsta ár. Næststørsti búskapurin í heiminum, tann japanski, fær harafturímóti eitt fall upp á 0,9 prosent í ár og ætlandi 1,3 prosent næsta ár, sigur IMF.

## Nýggja norska stjórnin longu í vanda

Ósemja um fíggjarlógina næsta ár kann gera enda á nýggju stjórnini hjá Kjell Magne Bondevik.

Tað var greitt, eftir at samráðingar millum teir tríggjar stjórnarflokkarnar og stuðulsflokkin Framburðsflokkin endaðu úrslitaleysar hóskvøldið.

Stjórnin hevur freist til tann 20. november at leggja uppskotið fram, og teir næstu dagarnar skal fíggjarnevndin hjá Stórtinginum viðgera uppskotið. Bæði stjórnarflokkarnir og Framburðsflokkurin halda fast um síni sjónarmið, og tí kann uppskotið ikki fáa meiriluta í verandi líki, tá Stórtingið skal atkvøða um tað tann 28. november.

Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharri sýtti í gjár fyri at siga, um hann er til reiðar at lata úrslitið av atkvøðugreiðsluni vera avgerandi fyri, um stjórnin fer at halda fram.

– Eg vóni, at Framburðsflokkurin heldur uppskotið hjá stjórnini vera betri enn tað, sum undanfarna stjórnin hjá Arbeiðaraflokkinum legði fram, segði Kjell Magne Bondevik í gjár.

Næstformaðurin í Framburðsflokkinum, John I. Alvheim, segði í gjár, at hann fer ikki at atkvøða fyri fíggjarlógaruppskotinum hjá stjórnini. Hann er sostatt til reiðar at fella stjórnina.

Framburðsflokkurin hevur kravt, at næsta fíggjarlógin skal umfata størri skattalætta enn tann, sum stjórnin hevur skotið upp, og harafturat krevur flokkurin, at avgjaldið á elektriskum streymi og rúsdrekka skal skerjast munandi.

# Bjargað av trygdarbeltinum



FERÐSLUÓHAPP

*Maria Kristina Smith, praktikantur*

Mánakvøldið tann 12. november um 11-tíðina, hendi eitt ferðsluóhapp á Sandi.

Fýra ung fólk vóru í bilinum, tey vóru á veg til Húsavíkar, tá ið førarin misti tamarhaldið á bilinum, sum endaði í einum grótgarði.

Førarin og persónurin beint aftan fyri hann fingu ongan skaða, persónurin undir liðini av føraranum breyt nøkur rivjabein og hevur møguliga punkterað tað eina lunga. Persónurin í miðjuni aftanfyri fekk skurðsár av trygdarbeltinum, og persónurin høgrumegin aftanfyri breyt annað kjálkabeinið.

Bilurin hevði píkadekk, og er tað lívshættisligt tá ið bilurin ikki hevur brúk fyri tí, sigur sýðslumaðurin á Sandi. Hann vil eisini vera við, at tað uttan iva var trygdarbeltið sum gjørdi at tey ungu ikki vóru verri fyri.

# Áhugaverdur Kvívíkstúrur

SPÁKINGARTÚRUR

*Maria Kristina Smith, praktikantur*

Í dag tann 17. november, verður skipa fyri áhugaverdum spákingartúri í Kvívík og er tað Ingigerð á Trønið sum stendur fyri tiltakinum.

Á túrinum verður greitt frá og hugt eftir søguligum tingum, sum t.d Urtagarðinum, víkingaútgrevstunum, kirkjuni og gomlu mylluni.

Eisini verður sjálvandi greitt frá kenda trolaranum »Stella Argus«, sum gekk burtur í 1957 við fleiri kvívíksingum umborð.

Túrar sum hesin verða gjørdir alt árið, serliga eru fjallatúrarnir væl dámdir, kanska tí, at hesir eru hugnaligir og óhátíðarligir, men fyrireikarnir kundu hugsa sær, at túrarnir til Havnar, høvdu fingið eins stóra undirtøku, tí at hesir eru sera áhugaverdir, siga tey.


KOYRING TIL VALSTAÐIÐ

| | | | |
|---|---|---|---|
| Tvøroyri | Býráðið | Eysturoy | 422145 |
| Vágar | 333371 | | ella 282145 |
| Suðurstreymoy | 310611 | Norðstreymoy | 421180 |
| Sandur | 222662 | Norðoyggjar | 261236 |
| Vágur | 373223 | | ella 261232 |

JAVNAÐARFLOKKURIN



SAMBANDSFLOKKURIN



ATLI HANSEN

RÍKISFELAGSSKAPURIN

X við B





SAMSTARV OG LOYSNIR

Áheitan frá umboðum Javnaðarfloksins í fíggjarnevndini, trivnaðarnevndini, vinnunevndini og rættarnevndini.



Henrik Old
Vágur

Hvør hevur støðugt forðað royndunum at lækka oljuavgjaldið?

Hvør noyðir føroyskar handverkarar at flyta av landinum?

- **Samgongan**

Hvør verjir fólkakirkjuna, so hon ikki verður loyst frá fólkinum?

Hvør lækkaði avgjaldið á bensini við 1 kr./liturin?

- **Javnaðarflokkurin**



Hans Pauli Strøm
Vestmanna

Hvør dýrkar bústaðarútreiðslurnar við at skerja rentustuðulin?

Hvør hækkaði blokkin 107 mill. til sín sjálvan og skerjir hann við 367 mill til tey sum koma aftaná?

- **Samgongan**

Hvør eigur lykilin til ta savnandi loysnina í sjálvstýrismálinum?

Hvør tryggjaði øllum barnsburðarfarloyvi? Og hvør herdi reglurnar móti siðamisbroti?

- **Javnaðarflokkurin**





Kristian Magnussen
Tórshavn

Hvør hevur verið óarbeiðsfør av klandri og ósemjum?

Hvør hevur onki røktarheimspláss útvegað í hesum valskeiði og svikið tey við skerdum førleika?

- **Samgongan**

Hvør avdúkaði skilaloysið í fullveldisætlanini?

Hvør skapti grundarlagið undir bankaavtaluni?

- **Javnaðarflokkurin**



Vilhelm Johannesen
Klaksvík

Hvør gevur partafeløgunum 25% í skattalætta?

Hvør herðir skattatrýstið hjá fólkinum við 5 %

- **Samgongan**

Hvør hevur støðugt sett uppskot fram um at lætta um hjá húsarhaldinum?

Hvør hækkaði aldursmarkið fyri barnafrádráttin úr 16 til 18 ár?

- **Javnaðarflokkurin**

Minnist til, at stívrent samband er lívsgrundarlagið hjá veruleikafjarum loysingarfólki! Við teimum hendir einki!

Savnandi loysnin hjá Javnaðarflokkinum ruddar slóð fyri, at lívskor og vælferð aftur kemur á dagsskrá!

JAVNAÐARFLOKKURIN